FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 5. november 2025
J. nr.: 25/28530
Viðgjørt: EC

Svar uppá fyrispurning nr. 52-036/2025 frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um ALS og AMEG á fíggjarlógini

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør er orsøkin til, at ALS og AMEG eru komnir á Løgtingsins fíggjarlóg?
2. Ætlar landsstýrið at broyta lógirnar viðvíkjandi ALS og AMEG, so tær loyva grunnunum at vera á fíggjarlógini?
3. Um ikki, ætlar landsstýrið at grunnarnir skulu av aftur fíggjarlógini?

Svar til spurning nr. 1:
ALS og AMEG eru ikki við í fíggjarlógini. Virksemið hjá grunnunum er enn sum áður skipað í sjálvstøðugum grunnum, eins og aðrir almennir grunnar.

Tó krevur § 41 í stýrisskipanini, at øll lógarkravd gjøld, skattir o.tíl. skulu takast við umvegis fíggjarlógina. AMEG kom við í uppskot til fíggjarlóg fyri 2025. ALS (og Trygdargrunnur Fiskivinnunnar) kom við í uppskot til eykajáttan í vár. Uppskotini vórðu viðgjørd og samtykt í Løgtinginum. Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2026 er framhald av játtanunum fyri 2025.

Talan er um sokallaðar netto null-játtanir, har upphæddin fer beinleiðis víðari til grunnin. Játtanin snýr seg um fíggjarliga heimild at krevja lógarkravdu gjøldini inn og hevur ikki ávirkan á grunnin sjálvan og virksemi hansara. Tað eru nógv dømi um tílíkar inntøkur undir § 20 í fíggjarlógini, t.d. gjøld til Vinnusjúkugrunnin, kommunur, kirkjur, ALS, AMEG.

Løgtingsgrannskoðararnir hava í nógv ár funnist at, at landsroknskapurin ikki er fullfíggjaður. Landsroknskapurin skal sambært § 1, stk. 2 í roknskaparlógini fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið. Lógarkravd gjøld skulu tí verða tikin við umvegis fíggjarlógina og í landsroknskapin.

Svar til spurning nr. 2:
Tað er ikki neyðugt at broyta lógirnar, tí at ALS og AMEG eru og skulu ikki við í fíggjarlógina. Í lógunum verður teksturin “inntøkur og útreiðslur grunsins verða ikki tiknar við í fíggjarlógina” brúktur. Tað er vanligur tekstur um tílíkar grunnar, har grunnurin og virksemi hansara ikki skulu

verða játtað í fíggjarlóg á hvørjum ári. Ein lóg er um grunnin, sum regluskipar virksemið neyvt í mun til ásetta endamálið. Tað er materiell heimild til grunnin og virksemið.

Sum greitt frá til spurning 1, skulu lógarkravd gjøld sambært § 41 í stýrisskipanini altíð verða tikin við umvegis fíggjarlógina.

Svar til spurning nr. 3:
Sum greitt frá, eru grunnarnir ikki við í fíggjarlógini, men lógarkravdu gjøldini skulu sambært § 41 í stýrisskipanini hava eina fíggjarliga heimild.

Tinganes, 05. november 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum